# Metvekt í Stakkinum

*Veðrarnir úr Tjørnuvíksstakki í ár eru teir bestu, nakrantíð eru komnir, siga tjørnuvíkingar, sum vóru í Stakkinum leygardagin*



Dávur Emil Hansen við tí stóra veðrinum

EDVARD JOENSEN

**Tjørnuvík:** Tann besti veðrurin, tjørnuvíkingar fingu úr Stakkinum í ár, vá 100 pund. Og tað er met, siga tjørnuvíkingar.

Leygardagin vóru tjørnuvíkingar í Stakkinum eftir veðrunum, teir hava havt gangandi har úti síðan einaferð í maj mánaða. Tríggir vóru teir, og teir royndust óføra væl. 74, 95 og 100 pund, vísti vektin, tá teir vóru flettir.

Teir góvu eisini væl av pengum í kassan hjá Stakkinum, sigur Dávur Emil Hansen, formaður i Stakksnevndini.

Dagurin var hildin sum eitt slag av stevnudegi í Tjørnuvík. Væl av fólki var komið til bygdar, tá seyðir og lundar úr Stakkinum vórðu seld á uppboðssølu klokkan fimm seinnapartin. Men áðrenn tað hevði verið ymiskt annað at upplivað í Tjørnuvík. Kular Røtur og tann navnframi Trølla Pætur høvdu vitjað, og tað varð sera væl umtókt í Tjørnuvík hendan dagin. Børnini hugnaðu sær óført.

Klokkan fimm varð so hildin uppboðssøla yvir tveir veðrar og nakað av lunda, sum goymt var til endamálið. Samlaða inntøkan av hesum var góðar 22.000,- krónur. Umframt varð tann triðji veðrurin lutaður burtur á lutaseðli. Tað gav 30.000,- krónur í kassan. So samanlagt gav tiltakið Stakkinum góðar 53.000,- krónur. Veðrarnir vórðu allir verðandi í Tjørnuvík. Tjørnuvíkingar keyptu teir báðar á uppboðsøluni, meðan ein tjørnuvíkingur vann tann, sum varð burturlutaður.

Peningurin, sum kom inn, fer allur til Stakkin, sigur Dávur Emil Hansen. Teir hava gjørt ymiskt við húsið í Stakkinum í summar, soleiðis at umstøðurnar hjá ferðafólki at koma út, vera betraðar. Og okkurt er eftir at gera, sum teir ætla at fáa frá hondini komandi ár, sigur hann.

Árið í ár skuldi annars verið sabbatár hjá Stakkinum, hvat seyði viðvíkur. Tað er soleiðis, at vanliga gongur seyður tvey ár í Stakkinum, og so er hann friðaður tað triðja. Men í ár varð avgjørt at seta tríggjar seyðir út í samband við aldrarskiftið, sigur Dávur Emil Hansen.

Teir plaga at sleppa seks óm og tveimum hornaseyðum út um heystið, sigur hann. Tey ganga so allan veturin. Lemba ærnar so um várið, verður tað so mikið meira at taka aftur um heystið. Vanliga eru tað avdeyðaær, teir sleppa út, meðan verðulombinbi plaga at vera sovorðin miðalgóð lomb.

Leygardagin vóru 39 fólk í Stakkinum eftir teimum trimum veðrunum. Farið varð klokkan átta á morgni, og beint eftir middag vóru tey aftur í Tjørnuvík.

Tá stakksfólkið var afturkomið, fingu tey øll lunda til døgurða í bygdarhúsinum.

Seinni leygarkvøldið varð skipað fyri Stakksdansi í bygdarhúsinum í Tjørnuvík.



Væl av fólki var í Tjørnuvík til uppboðsøluna leygardagin

## Leggja tak yvir Fútaklett

*Nýggj høll verður bygd á alistøðini Fútakletti. Talan er um betran av verandi umstøðum heldur enn útbygging av orkuni*



Smoltstøðin á Futakletti verður nú løgd undir tak

EDVARD JOENSEN

**Fútaklettur:** Á alistøðini Fútakletti í Vágum verður nýggj høll bygd yvir tey alikørini, sum nú standa úti. Umframt verður møguleiki at húsa ymsum, sum hevur ov ringar umstøður í dag.

Alistøðin á Fútakletti er ein av teinum størru í landinum. Har er bæði smoltaling og lívfiskur at strúka. Lívfiskurin gongur ikki bara á Fútakletti, uttan eisini í ringum á sjónum. Tey hava bæði laks og síl gangandi á Fútakletti. Tað arbeiða eini sjey fólk alt samdøgurði hvønn dag í viku á støðini.

Men umstøðurnar hava ikki verið nøktandi seinnu tíðina, sigur Atli Gregersen, stjóri ein av døgunum.

Fleiri av smoltkørunum standa úti, og tað er ikki nóg gott, sigur hann. Tí er farið undir at gera klárt til eina nýggja, stóra høll, soleiðis at kørini sleppa undir tak. Tá fer at bera til at taka lokini av, og tað ger tað beinanveg arbeiðsligari á støðini.

Tá støðin í síni tíð varð bygd, var virksemið ikki tað, tað er í dag. Alarmcentralur, starvsstova og matarhøli eru høli, sum treingja til nógv betri umstøður, enn tey hava í dag. Og tað er ein av ætlanunum við útbyggingini, sigur Atli Gregersen.

Hann sigur, at útbyggingin í meira mun er betran av umstøðunum, enn liður í ætlanum um at økja framleiðsluna nú beinanveg.

Útbyggingin verður norður eftir og oman um verandi bygningar, sigur Atli Greger. Samstundis verða parkeringsviðurskiftini og ferðslumøguleikarnir til og frá støðini bøttir munandi, sigur hann.

# Veðratíð er

*Nógvastaðni kring landið taka menn veðrar hesa árstíðina. Bæði av traðum og úr feitilendum. Og kappast verður um, hvør man eiga tann besta*

Menn ganga í hesum døgum kring bygdirnar og tosa um veðrar og vekt. Ymiskt er, hvussu roynist, men sum heild letur til, at árið fer at verða rímiliga gott.

Serliga eru tað teir, sum hava havt seyð gangandi í feitilendum, sum hava verið og tikið. Nógvastaðni er neyðugt at fara nakað tíðliga, tí veðurlíkindini kunnu gera, at tað skjótt gerst ov seint.

Vágamenn gera nakað av at hava seyð gangandi norðantil á og undir oynni. Eitt nú hava miðvingar seyð í Urðini, teir kalla, eystan fyri Ritunøvina.

Hósdagin vóru teir eftir seyði í Urðini, og har royndist bara væl.

Best var eitt heystlamb hjá Wensili Nattestad, sum vá heili 92 pund, tá tað varð flett.

**ej**



Krovini hjá Wensili eru vøkur. Tað minna vá 65 pund og tað størra 92





Tað er neyðugt við nýggjum og fvrískum hugskotum í Klaksvík, heldur Rani Nolsøe

# - Umráðandi við nýggjum valevnum

*Fólk skulu hava møguleikan at velja nýggj fólk í býráðið, og tí stilli eg upp, sigur Rani Nolsøe, sum tekur stigið inn í politiska heimin*

EYÐUN KLAKSTEIN

Hann er helst best kendur sum gittarspælari, sangari og komponistur í tónleikabólkinum Frændur, men næstu vikurnar verður tað neyvan gittarin, sum hann fer at hava fremst í huganum.

Rani Nolsøe tekur nú stigið inn í politiska heimin, har hann skal royna at gera vart við seg og sín flokk til býráðsvalið í Klaksvík.

- Tað er umráðandi, at fólk hava møguleikan at velja nýggj fólk í býráðið, og tí stilli eg upp, sigur Rani Nolsøe.

- Eg vóni, at fleiri nýggj fólk stilla upp til býráðsvalið, tí neyðugt er við nýggjum og frískum hugskotum í býnum. Tað er gott við eitt sindur av útskifting í býráðnum.

Rani Nolsøe verður eitt av valevnunum hjá Tjóðveldisflokkinum til býráðsvalið í Klaksvík. Flokkurin hevur í løtuni tveir limir í býráðnum, og teir skal flokkurin royna at endurvinna og kanska leggja afturat.

### Orða greiðan politikk

Í tónleikabólkinum Frændur, har Rani hevur verið limur síðani bólkurin byrjaði, hevur politikkurin ikki verið goymdur av vegnum.

- Vit hava altíð gjørt og spælt tónleik við eini meining. Vit havt nøkur sjónarmið, og vit hava ført tey fram. Politiska medvitið hevur alla tíðina verið har, sigur Rani Nolsøe.

Og nú Rani skal seta orð á tann meira ítøkiliga politikkin, hann er til reiðar at føra, leggur hann dent á, Klaksvík má orða ein greiðan politikk á teimum stóru økjunum.

- Vit skulu seta okkum nøkur mál, sum vit skulu røkka áðrenn næsta val, og Klaksvík skal satsa upp á sínar sterkur síður -, fiskivinnuna og alingina, sigur hann.

Rani Nolsøe heldur, at fiskivinnan skal kunna lokka útbúgvið fólk, og at tað eisini skulu verða útbúgvingarmøguleikar innan fiskivinnuna.

### Fyrireika seg til tunnil

Ætlanin er, at farast skal í gongd við ein undirsjóvartunnil til Klaksvíkar, tá Vágatunnilin er liðugur, og tað heldur Rani, at Klaksvík skal fyrireika seg til.

- Vit skulu hava ein undirsjóvartunnil, eingin ivi um tað, og tað er neyðugt hjá mentanarlívinum og handilslívinum at fyrireika seg til undirsjóvartunnilin, tí tað er á teimum økinum, vit kom at merkja fyrstu kappingina frá meginøkinum, sigur hann.

Og við eini greiðari hugsan um, at barnarøkt og eldrarøkt skal verða góð og virðilig, fer Rani Nolsøe nú undir valstríðið áðrenn býráðsvalið hálvan november.



Rani Nolsøe bjóðar nú elituni í býráðnum av

# Sambandslistin greiður í Klaksvík

*Einasti býráðslimurin hjá Sambandsflokkinum stillar uppaftur*

**Klaksvík:** Betta Joensen er eitt av teimum 10 nøvnunum, sum Sambandsflokkurin hevur á sínum lista til býráðsvalið í Klaksvík. Hon varð vald í býráðið seinasta val og stillar uppaftur hesaferð.

Hini fólkini á Sambandslistanum eru Eyðfinn Hansen, Hans Jacobsen, Julius Johannesen, Dánjal Klakk, Elmar Krosstein, Absalon Matras, Fanny Olsen, Poul Martin Rasmussen og Olga Østerø.

Vikuskifti í
ABERDEEN
Vikuskiftis tilboð galdandi hósdag - mánadag



**Skene House Rosemont**
Prísir pr. persón um 6 fólk búgva saman kr. **2.310,-**

**Thistle Altens*****
Prísur pr. persón í dupultkamari kr. **2.710,-**

**Copthorne Hotel******
Prísur pr. persón í dupultkamari kr. **2.950,-**

**Vikuskiftistilboð frá Europcar**
Frá fríggjamorgun - mánamorgun prísir úr kr. **1.044,-**

**Nøkur tiltøk í Aberdeen í heyst**

16 sept Bob Dylan konsert
23 sept Country Fair
23 sept UU2 konsert
24 sept Magic / Freddy Mercury Show
12 okt Status Quo konsert
27 okt Abbamania

**Fótbóltur í heyst**
Heimadystir hjá Aberdeen

09 sept St. Johnstone
30 sept Celtic
14 okt Dundee
21 okt Dunfermline

Atlantic Airways
TEL 333 900 · FAX 333 380